# NSÍ

Nes Sóknar Ítróttafelag
FO-620 Runavík
www.nsi.fo

STOVNAÐ
24.03.1957

FORMAÐUR
Dánjal Petur Hansen

MEISTARAR (1)
2007

STEYPAVINNARAR (2)
1986 og 2002

GREIPUVINNARAR
Ongantíð

Í 1. DEILD (22 ár)
1976, 1979, 1984-1988, 1991-1992, 1994-1995, 1997-

Í EUROPA (3)
UEFA Cup 2003/04, 2005/06, 2007/08
Intertoto 2004/05

# At verja FM heitið er stór avbjóðing

## At verja FM heitið er stór avbjóðing

Søgurnar eru fleiri um, at tað ikki altíð hevur hilnast so væl, tá ið tey, sum fyri fyrstu ferð hava rokkið toppin, skulu verja sína støðu.

Í fjør vann NSÍ FM fyri fyrstu ferð. At enda var sigurin sannførandi. Liðið var góð blanding av royndum og ungum spælarum, og tað sigur seg sjálvt, at nýggju meistararnir teljast millum favorittarnar í ár.

NSÍ fór um tey fimmti í fjør, og alt felagið sum tað var, og sjálvsagt eisini spælararnir vóru ógvuliga svong eftir at vinna FM. Tað eydnaðist, og nú er spurningurin, um spælararnir eru so uppsettir og svangir, sum teir vóru tað í fjør. Ikki minst hetta fer at vera avgerandi fyri, um NSÍ aftur skal røkka tindinum.

Sammett við í fjør eru eyðsýndar manningarligar broytingar. Veteranarnir Jens Martin Knudsen og Pól Thorsteinsson eru givnir, og Christian Høgni Jacobsen er fluttur aftur í HB. Tórður Thomsen er upplagdi avloysarin millum stólparnar. Eingin ivi er um, at hann er evnagóður, men tað sigur seg sjálvt, at hann ikki hevur royndirnar hjá Jens Martini. Tær fáast bara við at spæla við í nógvum og tøttum dystum.

Í fjør vunnu fleiri ungir spælarar sær fast pláss á FM liðnum. Bogi Løkin, sum var fastur maður á U21 landsliðnum, varð kosin ársins ungi spælari, og Jóhan Troest Davidsen og Einar Hansen røktu vongverjarnar so mikið væl, at teir vunnu sær landsliðssess. Liðformaðurin Óli Hansen stóð seg so mikið væl, at landsliðsboð vóru eftir honum.

Fyri bara einum ári síðani var tað so at siga sum lundi á jólanátt, at boð vóru eftir NSÍ spælarum til landsliðið. Tað boðar frá dygdum og breidd, at NSÍ nú er eitt av feløgunum, sum eigur flestar landsliðsspælarar. Umframt teir omanfyri nevndu er Hjalgrím Elttør eisini partur av landsliðnum.

Í fjør var Nenad Stankovic miðdepilin á miðvøllinum. Har verður hann eisini í ár. Umframt henda serban hevur NSÍ mett, at tað hevur verið neyðugt at keypa fleiri aðrar útlendskar spælarar, sum sjálvandi leggja trýst á ungu spælararnar. Nýggj serbisk nøvn í Runavík eru Milan Pejcic, Dejan Stojkovic og Aco Pandurevic. Aco ætlast at loysa Pól Thorsteinsson av, Milan ætlast at kappast við Sjúrð Jacobsen, Jann Martin Mortensen og Pól Jóhannus Justinussen, sum er komin aftur úr Gøtu, um miðvallarpláss, og Dejan skal saman við Andy Olsen og Øssuri Dalbúð kappast um pláss í álopinum undir liðini á Jónhardi Frederiksberg. Eftir trilvandi byrjan í NSÍ í fjør, tykist Jónhard aftur at hava funnið stevið, sum í Skála tíðini bar landsliðssess við sær.

Jóhan Nielsen stýrir framvegis NSÍ. Liðið er heilt víst komið væl longri í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið, enn fleiri onnur eru tað. Í heyst fæst at síggja, hvussu NSÍ megnaði stóru avbjóðingina, sum tað er at verja FM heitið.

Møguleikin at vinna steypakappingina er burtur. Nú er avbjóðingin at endurvinna FM.



*Jens Martin Knudsen takkiaði fyri seg eftir FM-gullið í fjør. Men avgjørda málið er framvegis at verja gullið*

| | |
|---|---|
| **MÁLVERJAR** | Áður spælt við |
| Tórður Thomsen | ÍF, AB |
| Predrag Stankovic | |
| **VERJA** | |
| Óli Hansen | |
| Einar Hansen | |
| Johan T. Davidsen | |
| Aco Pandurovic | VB/S |
| Pól J. Justinussen | GÍ |
| Monrad Holm Jacobsen | |
| Filip Jacobsen | |
| **MIÐVØLLUR** | |
| Bogi Løkin | |
| Nenad Stankovic | Skála |
| Milan Pejci | |
| Jann Martin Mortensen | |
| Sjúrður Jacobsen | |

| | |
|---|---|
| **ÁLOP** | Áður spælt við |
| Dejan Stankovic | |
| Andy Olsen | |
| Jónhard Fredriksberg | Skála |
| Øssur Dalbúð | |
| Hjalgrím Elttør | KÍ, Fremad Amager |
| Klæmint Olsen | |
| Pætur á Líknagøtu | |
| **TILGONGD** | |
| Aco Pandurovic | |
| Pól J. Justinussen | |
| Milan Pejci | |
| Dejan Stojkovic | |

| | |
|---|---|
| **FRÁGONGD** | |
| Jens Martin Knudsen | givin |
| Pól Thorsteinsson | VB/S |
| Brynjólvur Nielsen | av landinum |
| Jústinus R. Hansen | av landinum |
| Christian Høgni Jacobsen | HB |

**VENJARI**
Johan Nielsen

**HJÁLPARVENJARI**
Pauli Hansen